Treyta› frádøming er vápni›

Fyrr var einki gó›a mamma, um tú í bygdum øki koyrdi meir enn 70 km/t. Eftir n‡ggju lógini fært tú eina bót og treyta›a frádøming av koyrikortinum.

Dia Midjord

Ver›ur tú tikin at koyra ov skjótt, og koyrikorti› ver›ur treyta› frádømt, so fært tú eina royndartí› upp á 3 ár.

Kemur tú aftur í klórnar á politinum, so fellur hamarin og koyrikorti› r‡kur. Og ta› er líkamiki›, um talan tá er um eitt anna› brot á fer›slulógina.

Hevur tú treyta›a frádøming av koyrikortinum, noy›ist tú upp til eina roynd, i› fevnir bæ›i um teori og praksis. Bileftirliti› setir eina freist og tú mást l‡›a harrabo›um. Annars missir tú koyrikorti›.

Lægri promillumark

Marki› fyri promillukoyring er flutt ni›ur frá 0,8 til 0,5.

Ver›ur tú tikin vi› millum 0,5 og 0,8 promillu í bló›inum, fært tú treyta›a frádøming av koyrikortinum og eina bót. Royndartí›in er tr‡ ár. Br‡tur tú aftur fer›slulógina, missir tú koyrikorti›.

Ver›ur tú tikin vi› millum 0,8 og 2,0 promillu í bló›inum, missir tú koyrikorti› og fært eina bót.

Ver›ur tú tikin vi› meir enn 2,0 promillu í bló›inum, missir tú koyrikorti› og skalt inn at sita.

Fútin væl nøgdur



Mogens Nepper-Christensen ivast ikki eina løtu í, at n‡ggja fer›slulógin er munandi betri enn tann gamla

Dia Midjord

– Eg ver›i skuffa›ur, um n‡ggja fer›slulógin ikki fer at hjálpa til, at vit fáa munandi færri fer›sluóhapp, sigur fútin Mogens Nepper-Christensen.

Fútin hevur sjálvur veri› vi› til at smí›a n‡ggju lógina og ivast onga løtuna, at føroyingar nú hava fingi› eina nógv betri fer›slulóg. Hann leggur kortini dent á, at lógarsmí› er bert ein partur, tá ein skal royna at minka um fer›sluóhappini.

– Uppl‡sing er ein annar minst líka t‡›andi partur, sigur Mogens Nepper-Christensen.

N‡ggja fer›slulógin kemur í gildi 1. juli.

Tr‡ fólk stilla ikki uppaftur

Lisbeth. L. Petersen, Katrin Dahl og Kaj Leo Johannesen gevast vi› b‡rá›spolitkki eftir hetta skei›

Katrin Dahl

Lisbeth L. Petersen



Kaj Leo Johannesen

Dia Midjord

Fær Sambandsflokkurin somu undirtøku vi› komandi val, so ver›a minst tvey n‡ggj andlit at síggja. Tey bæ›i Lisbeth L. Petersen og Kaj Leo Johannesen hava bæ›i avgjørt ikki at stilla uppaftur. Katrin Dahl úr Fólkaflokkinum hevur eisini avgjørt at takka fyri seg.

Eftir hvat vit hava frætt, so stillar restin av verandi b‡rá›spolitikarum í Havn uppaftur.

Ta› er kortini ikki endaliga greitt, nær kommunurá›svali› ver›ur. Stendur ta› upp til løgmann Anfinn Kallsberg, ver›ur vali› hesafer› tríggjar vikur framskunda› til 16. november. Men hetta skal løgtingi› siga sína meining um.

Ætlar sær í løgtingi›

Kaj Leo Johannesen sigur vi› Sosialin, at hann í dag ikki hevur tí› at røkja allar sínar uppgávur til fulnar, og tí gevst hann vi› b‡rá›spolitikki.

– Ver›ur talan um politikk í framtí›ini, so ver›ur ta› landspolitikkur, sigur Kaj Leo Johannesen og leggur aftrat, at áhugin serliga er fyri fiskivinnu.

Lisbeth L. Petersen váttar, at hon ikki hevur trivist væl í hesi setu, sum er hennara fjór›a. Átta ár hevur hon virka› sum varab‡rá›sforma›ur og 4 ár sum forma›ur

– Hugurin fór longu, tá samgonga bleiv skipa›, og vit vóru sett uttan fyri alla ávirkan.

Katrin Dahl ætlar sær fyrst og fremst at brúka tí›ina upp á síni seks ommubørn. Hon er 65 ár og hevur veri› sekstan ár í politikkinum. F‡ra ár sum limur í barnaverndini og tólv ár í b‡rá›num.

– Nú er nokk. Men hesa tí›ina vildi eg kortini ikki veri› fyriuttan, sigur hon.

Ingi eigur ongan gó›an

– Eingin politiskur flokkur sleppur at st‡ra mínum avger›um, sigur Ingi Mohr

Dia Midjord

Ingi Mohr hevur ikki endaliga avgjørt, um hann stillar upp til komandi val. Ta› ver›ur so ikki á listanum hjá einum politiskum flokki.

– Eg gó›taki ikki, at mín avger› ver›ur st‡rd av onkrari politiskari lei›slu. Eg vil sleppa at taka ta avger›, i› gagnar best Tórshavnar kommunu, sigur Ingi Mohr.

– Um eg stilli upp, so ver›ur ta› á einum samansettum borgara- og vinnuflokki.

Ingi Mohr vónar, um so ver›ur, at hann og flokkurin fáa stu›ul frá argjamonnum og kollfir›ingum.

– Ta› er nógv lættari hjá teimum at fáa eitt umbo› í b‡rá›i›, um tey samla› velja at stu›la einum flokki, sigur hann.

Gransking:

Býtisbarnið hjá føroysku fiskivinnuni

– Gransking er annað en at hyggja í mikroskop og dilla við molekylum. Føroyska vinnan má fáa eyguni upp fyri at gransking í longdini kan spinna stór virði inn í føroyska fiskiíðnaðin!

Bjørt Samuelsen skrivar:

– Gransking og menning eru nær tengd. Eingin yvi er um at granskingin er grundarlagið undir at fáa størri peningaliga úrtøku úr fiskivinnuni – hóast tað ikki altíð hendir alt fyri eitt, sigur Turið Mørkøre, sum dagliga starvast sum granskari hjá norsku fyritøkuni AKVAFORK í Ås. Har arbeiðir hon við góðskumenning av laksi og síli – eitt nú at fremja rættan lit og fastleika, og at stýra fitiinnihaldinum í fiskinum.

Turið Mørkøre, Sjúrður Joensen og Janet Fríða Johannesen hittast í hesum døgum í Norðurlandahúsinum í sambandi við eina vesturevropeiska ráðstevnu um fiskiíðnaargransking. Granskarar úr 17 ymiskum londum leggja úrslit av granskingarroyndum fram.

Sjúrður Joensen starvast sum granskari á Fiskeriforskning í Tromsø. Hann hevur arbeitt nógv við menning av fiskavørum. Millum annað granskar hann hvussu ein best tinar frystan fisk sum skal nýtast til saltfisk.

Janet Fríða Johannesen starvast hjá fyritøkuni Atlanticon, fyrrverandi Faroe Fishconsult. Hon hevur gjørt prosjektir fyri ymiskar fyritøkur og eisini fyri Heilsufrøðiligu starvsstovuna. Tá Janet Fríða flutti heim til Føroyar í 1994 byrjaði hon sum vørumennari hjá Fiskasøluni.

– Tað var lítið man legði í gransking og vørumenningina tá. Tíðirnar vóru ringar, og umstøðurnar vánaligar at arbeiða undir, sigur Janet Fríða. Í dag arbeiði við ráðgevandi arbeiði, sum ikki kan kallast gransking.

Ov trongar umstøður

Turið og Sjúrður eru bæði samd um, at stórir partar av tí tey gera í dag, ikki hevði verið møguligt at gjørt í Føroyum.

– Nakað hevði ein sjálvandi kunna gjørt, men umstøðurnar eru nógv betri í Norra. Har eru nógv meira pengar, sigur Turið, sum ger serritgerð á Phd-stigi í Norra. Hon verður væntandi liðug til jóla.

– Tað sær út, sum man byrjar at prioritera at útbúgva fólk á hægri stigi í Føroyum nú, men higartil hevur ikki verið møguligt hjá mær at taka Phd í Føroyum.

– Men viljin er ikki nokk. Ein má hava eitt umhvørvi – eitt nú aðrar granskarar at diskutera úrslitini við. Og sjálvsagt má ein hava atgongd til mátitólini sum skulu til, sigur Turið.

Hesum er Janet Friða púra samd í:

– Tú hevur eingi sonevnd pilotanlegg at gera royndir á her. Nakrar fáar kemiskar analysur kanst tú fáa gjørt á Starvsstovuni, men hettar er langt í frá nøktandi. Tað eru ov fá sløg av royndum tú fært gjørt í Føroyum, sigur hann.

Tørvandi íløgur

- Tað eru tørvandi íløgur í amboð, og harfturat eru eingir pengar settir av til eina miðstøð av granskarum, sigur Janet Fríða, sum kortini ikki heldur tað vera so trupult at fáa pengar til gransking.

– Men tað er torført at fáa nokk til eina áhaldandi gransking, sum gevur nakað í einum longri perspektivi. Føroyski fiskiíðnaðurin hevur brúkt so nógva orku uppá at yvirliva. Tey hava ikki duga at sæð nyttuna av granskingini – tað at tú kanst fáa tað inn í vinnulívið seinri. Føroyska vinnan hevur ringt við at góðtaka at granskingin ikki altíð kan nýtast beinleiðis. Aðra staðni gerst tú kanska tíggju prosjektir, og av teimum er tað bert eitt sum beinleiðis kan nýtast og geva nakað av sær í vinnuni. Tað forstáðilisi fyri granskingini, hevur man ikki havt higatil, heldur Janet Fríða.

Uppá spurningin um hvørt "norsku" granskararnir kundu hugsa sær at starvast og granska í Føroyum smílast tey bæði:

– Tjaaaee, júú … tað hevði verið øført. Men skalt tú granska mást tú hava umstøðurnar og fleiri pengar enn bara lønina, sigur Turið avgjørd. Hon kundi kanska hugsa sær at vent aftur til klettarnar, men ikki fyri einhvønn prís og ikki fyri at starvast við hvat sum helst.

– Tað tekur langa tíð at byggja eitt granskingarumhvørvi, og er tí ongantíð ov skjótt av fara í gongd, heldur Turið.

I Tromsø hevur Sjúrður arbeitt við fleiri prosjektum í samstarvi við – og beinleiðis rættaði móti vinnuni. Hann heldur sjálvandi tað vera ein fyrimun, skuldi hann sett kós hendanvegin:

– Eg kundi hjálpt virkjum at seta í gongd ting, ein veit er rætt at gera og sum bara ov fá vita um, sigur Sjúrður sum kortini yvast eitt sindur í um pengar høvdu verið tøkir til slíkar ætlanir.

Framtíðin

Men hvat skal so til fyri at fáa eitt granskingarumhvørvi rættuligt upp á beinini í Føroyum. Her svara øll trý sum við ein munn:

– Pengar!!!

– Og so hugburðurin sjálvandi. Tað kan virka sum ein hugburðarbroyting er á veg. Til dømis tosar umboð fyri Fiskavirking um at fáa ein phd student hendan vegin, at arbeiða við vørumenning.

– Ein átti at samla granskarar sum eru í Føroym og nýtt orkuna í felagið. Einasta skipaða granskingin sum er í Føroyum er á Starvsstovuni og tað er alt ov lítið, sigur Janet Fríða. Hon vísir til at ein bólkur er settir at kannað hvat vinnuni tørvar

– Tað verður sera spennandi at siggja hvat sum kemur burturúr, og um tað verður byrjanin uppá meira málrættaða fiskiíðnaðargransking í Føroyum. Í alivinnuni tosar ein til dømis nógv um at leggja saman við útlendskum fyritøkum fyri at fáa tað vitan tey hava uttanlanda. Ein kundi eins væl roynt at samla tær kreftir sum eru her heima, fyri at fáa vitanina sum faktisk longu er her fram og út , sigur Janet Fríða.

Turið Mørkøre

Janet Fríða Johannesen

Sjúrður Joensen

Góð ráð

At enda geva tey trý føroysku politikararunum og føroysku vinnuni hesi ráðini:

Sjúrður: – Samstarv millum gransking og íðnaðin, og norðurlandasamtarv. Tað eru fleiri norðurlendsk prosjektir sum ganga á hvørjum ári, men føroyingar er næstan ongantíð við.

Turið: – Menningarstovnurin tosar um at savna føroyskar granskarar sum starvast uttanlanda og her heima. Her kan ein gera status: Hvat veit man, hvørji trupuleikar eru og hvussu fer man fram víðari. Tað kan verða ein flott byrjan – væl at merkja um tað verður fylgt upp!

Janet Fríða: – Tú mást hava eina basu har nøkur eru í føstum starvi. À einari granskingarmiðstøð skulu virkini so eisini kunna keypa sær tímar – ymiskar granskingartænastur sum teimum tørvar. Ein kundi álagt virkjunum eitt granskingargjald, sum varð ein grundfígging, soleiðis at øll vinnan er við til at gjalda.